# Tað er ikki vandamikið at eta fisk

**Pál Weihe, yvirlækni á deildini fyri Arbeiðs-og Almannaheilsu, er slett ikki samdur við granskarum um, at tað er vandamikið at eta fisk undan Føroyum. – Hetta er ein misskilj-ing, sigur hann**

FISKUR OG HEILSA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Pál Weihe, arbeiðsmedisinari, sigur, at í Ameriku verða fiskur og hvalur partvís tikin undir einum, og tað gevur sjálvsagt eina skeiva mynd av støðuni. – Eg eri slett ikki samdur í, at tað er skaðiligt hjá okkum føroyingum at eta fisk*

Í norska blaðnum, Aftenposten, er grein herfyri um kyksilvurkanningina, sum er gjørd av føroyskum børnum og mammum teirra.

Í greinini verður sagt, at "kyksilvur í fiski kann elva til heilaskaða".

Víst verður á, at amerikanskir granskarar hava funnið samanhang millum nøgdina av kyksilvuri í kroppinum á nýføddum børnum og mammum teirra og óvanligan heilaatburð hjá børnunum, tá ið tey gerast eldri.

– Hetta er órógvandi, serliga í londum, har sjómatur er ein týdningarmikil partur av føðini, sigur Philippe Grandjean, sum hevur havt leiðsluna av amerikansku, donsku og japansku granskarunum.

Lagt verður aftrat, at føroyingar eta nógvan sjómat, og sambært granskarunum er stórur partur av fiskinum fongdur við kyksilvurinnihaldi, sum er hættisliga høgt.

At enda verður sagt, at 1000 mammur og børn í Føroyum eru vorðin kannaði av kanningarbólkinum, har børnini vórðu kannaði, tá ið tey vóru nýføðingar og seinni, tá ið tey vóru 7 og 14 ára gomul.

## Ikki vandamikið

Pál Weihe, sum er yvirlækni á deildini fyri Arbeiðs-og Almannaheilsu, er slett ikki samdur við granskarunum um, at tað er vandamikið at eta fisk undan Føroyum.

– Hetta, sum ført verður fram, er ein misskiljing. Tað er ikki vandamikið at eta fisk. Og tað hava vit heldur ongantíð sagt. Vit hava hinvegin sagt, at tað er sunt at eta fisk, tí eitt nú fitisýrurnar eru so góðar fyri okkum.

Pál Weihe sigur, at í Ameriku verða fiskur og hvalur partvís tikin undir einum, og tað gevur sjálvsagt eina skeiva mynd av støðuni.

– Vit vita, at nógv kyksilvur er í hvali, og tí hava vit mælt til, at minkað verður um átið av hesum. Tað hevur eisini gjørt mun fyri kyksilvurinnihaldið í menniskjum, at grind ikki verður etin so ofta.

Arbeiðsmedisinarin vísir á, at lítið kyksilvurinnihald er í eitt nú toski og hýsu og annars teimum fiskasløgum, vit vanliga eta nógv av.

– Tað er tí als eingin trupulleiki fyri heilsuna at eta hesi fiskasløg, tvørtur ímóti.

Hann vísir á, at skulu vit tosa um nøgdir av kylsilvuri í fiski, kunnu vit kanska finna tær í onkrum gomlum kalva.

– Men tað er toskur og hýsa, vit eta mest av; so hetta er eingin trupulleiki, sigur hann.

## Ikki samanberast

Pál Weihe sigur, at trupulleikin hjá eitt nú amerikumonnum og øðrum við fiski er nógv størri enn hjá okkum, og tí kunnu viðurskiftini heldur ikki samanberast.

– Svørfiskur og tuna bera munandi størri nøgdir av kyksilvuri enn tey fiskasløg, vit eta. Tí kann fiskamaturin, sum tey eta og tann, sum vit eta, ikki samanberast. Og tá ið so hvalur stundum verður roknaður uppí fiskin, kunnu úttalilsir sum hesi gerast rættiliga misvísandi, sigur arbeiðsmedisinarin, sum tí slett ikki er samdur í, at tað er skaðiligt hjá okkum føroyingum at eta fisk.

# 160.000 pund í keðiligum líkindum

**Tá ið minni kemur uppá land, og nógvir eru um at selja fiskin, verður eisini minni í part. Hetta hava tey seinastu tíðina eisini merkt á landingarmiðstøðini hjá Beta í Saltangará**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Tá ið Sosialurin vitjaði framvið bryggjuni í Saltangará mánamorgunin, lá norski línubáturin, Skarhaug, og tók agn. Hann fer helst undir Føroyar at royna eftir brosmu og longu*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Mánamorgunin landaðu Bakur og Stelkur í Saltangará. Skipini høvdu 160.000 pund, meginparturin upsi. Sagt verður, at líkindini hendan túrin vóru vánalig við sjaskveðri.

Fleiri skip hava ligið inni seinastu dagarnar og bíðað eftir betri líkindum. Tískil er ikki væntandi, at nakrar serligar nøgdir av fiski koma uppá land í hesi vikuni.

Á landingarmiðstøðini hjá P/F Beta, har Bakur og Stelkur landaðu mánadagin, vænta tey ikki tað heilt stóra teir næstu dagarnar.

– Hini skipini hjá okkum hava ligið, og nú verður bíðað eftir, at líkindini gerast betur.

Væntandi fóru Bakur og Stelkur útaftur kl. 15 í gjár.

Tá ið minni kemur uppá land, og nógvir eru um at selja fiskin, verður eisini minni í part.

Hetta hava tey seinastu tíðina eisini merkt á landingarmiðstøðini hjá Beta í Saltangará.

## Norskur línubátur

Tá ið Sosialurin hugdi framvið mánamorgunin, lá ein norskur línubátur, Skarhaug úr Ålesund, við bryggju í Saltangará.

Sum skilst, er hann ikki komin higar at landa, men at keypa agn frá Frostgoymsluni í Saltangará.

Skarhaug fer helst undir Føroyar at royna eftir brosmu og longu.

– Eg vil siga, at tað hevur verið í minna lagi við landing seinastu tíðina, siga tey á Beta.



# Ice Lady kom úr havsneyð

**Farmaskipið, Ice Lady, kom leygardagin í rættiligt ódnarveður vestanfyri Føroyar. Farmaskipið fekk stóra slagsíðu og bingjurnar á dekkinum slitnaðu. Ice Lady legði kortini í øllum góðum at bryggju í Havn seinnapartin sunnudagin. Framvegis er óvist, hvussu stórur skaðin er.**

Í HAVSNEYÐ

*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Ice Lady er skársett í Kingstown í Karibia. Tá skipið kom á Havnina mundi slagsíðan vera eini 15-20 stig*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

Stutt fyri klokkan seks leygarkvøldið setti farmaskipið, Ice Lady, seg í samband við Tórshavnar Radio. Skipið hevði fingið ein sjógv vestanfyri Føroyar og lastin hevði skotið seg.

Boð vóru alt fyri eitt send eftir Brimli og nakrar tímar seinni var hann á staðnum. Brimil og Ice Lady fylgdust til Havnar og klokkan 14 sunnudagin varð farmaskipið bundið við bryggju í Havn.

## Ódnarveður

Farmaskipið var á veg úr Íslandi til Póllands og kom í óðnarveður vestan fyri Føroyar. Veðrið var sera vánaligt á leiðini og skipið fekk ein stóran sjógv. Lastin skeyt seg og tvær bingjur, sum stóðu á dekkinum, slitu seg leysar.

Stórur vandi var fyri, at leysu bingjurnar kundi elva til skaða á annað síðuportrið og tá hevði veruligur vandi verið á ferð. Ice Lady hevði stóra slagsíðu og portrini vóru partvís undir vatnganginum. Høvdu síðuportrini fingið størri skaða, kundi Ice Lady rættiliga verið komin í óførið.

Hóast Brimil fylgdi Ice Lady til lands, megnaði farmaskipið sjálvt at sigla til Havnar.

## Bingjur í sorli

Tá Ice Lady legði at bryggju seinnapartin sunnudagin stóð sjógvurin hálvan annan metur í lastini. Menn av Brimli tømdu skipið við pumpum og Skipafelag Føroya tók bingjurnar av dekkinum. Tær vóru allar í sorli og allar vørurnar eru farnar fyri skeytið.

Sum skilst verður ikki neyðugt at beina lastina burtur. Lastin á Ice Lady er meginparturin sild, makrelur og annar pelagiskur fiskur.

## Rætta skipið

Mánamorgunin vóru bæði Skipafelagið og Skipasmiðjan umborð á Ice Lady. Farmaskipið hevur eina slagsíðu á eini 15-20 stig og mánamorgunin var fremsta uppgáva at rætta skipið aftur. Árni Dam á Skipafelagnum sigur, at Ice Lady hevur eisini trupulleikar við nøkrum rørum, sum Tórshavnar Skipasmiðja skal bøta.

## Møguligt stórarbeiði

Tað ber enn ikki til at siga, hvussu stórur skaðin á Ice Lady er. Árni Dam sigur, at tað møguliga kann gerast til eitt stórarbeiðið at fáa farmaskipið siglingaført aftur. Tað eru normenn, sum eiga Ice Lady. Farmaskipið er kortini skrásett í Karibisku oyggjunum.



*Bingjurnar á dekkinum fóru í knús. Tá trukkurin hjá Skipafelagnum tók aðra teirra í land, fór botnurin undan*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*



*Menn av Brimli komu umborð við pumpum. Nógvur sjógvur var komin í lastina. Har stóð sjógvurin hálvannannan metur*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*



*Árni Dam á Skipafelag Føroya á bryggjuni og kannar skaðan, ið Ice Lady fekk í ódnarveðri vestanfyri leygardagin*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*